*Sera stórur áhugi fyri oljuráðstevnu:*

# 15 føroyingar á oljuráðstevnu í Aberdeen

Jan Müller, Aberdeen

Tað er sera stórur áhugi fyri oljuráðstevnuni, sum verður hildin í Aberdeen í hesum døgum. Tilsamans 200 fólk úr fleiri londum er við, og so gott sum øll tey kendu og stóru oljufeløgini hava sent umboð á ráðstevnuna, sum viðger útviklingin vestan fyri Hetland í sambandi við eina komandi oljuvinnu.

Millum teir 150 til 200 luttakararnar eru einir 15 føroyingar, teirra millum umboð fyri oljufyrisitingina og vinnuna í Føroyum.

Alison Wilson, sum stílar fyri ráðstevnuni, sigur, at tey høvdu ikki roknað við so stórari luttøku. - Men hetta er jú eitt ómetaliga áhugvert øki sæð við eygunum hjá oljuvinnuni, so er skilji væl, at áhugin er so stórur sigur Alison Wilson, sum er sera fegin um, at eisini nógvir føroyingar eru við. Hon heldur, at tað er einki annað enn náttúrligt, at føroyingar vísa eini slíkari ráðstevnu ans, tí stóru oljufundini vestan fyri Hetland liggja jú beint upp at føroyska markinum.

At henda oljuráðstevna verður hildin júst í Aberdeen er heldur ikki so løgið, tí umframt at vera oljuhøvuðsstaðurin í Bretlandi, so er tað júst útfrá Aberdeen, at tey stóru oljufeløgini arbeiða, tá tað snýr seg um oljuútviklingin vestan fyri Hetland.




*Millum 15 av heimsins størstu fyritøkum eru fleiri av oljufeløgunum, ið hava stóran áhuga fyri Føroyaøkinum og sum eru umboðaðar á oljuráðstevnuni í Aberdeen*



*Pílurin vísir okkum, hvar oljan er funnin vestanfyri Hetland. Vit síggja tað nógvu virksemi í Norðsjónum. Nú hyggja oljufeløgini vestureftir móti Føroyum*

# Mobil Oil áhugað í føroyskum øki

Jan Muller, Aberdeen




*Hettta kortið er frá 1982. Longu tá varð økið millum Føroyar og Hetland útpeikað sum eitt av teimum stóru og spennandi framtíðar oljuøkjunum*

Stóra amerikanska oljufelagið Mobil Oil er eitt av teimum mongu oljufeløgunum, sum er umboðað her á oljuráðstevnuni í Aberdeen. Pressutalsmaðurin hjá felagnum, Phil Sands sigur við Sosialin, at Mobil hevur stóran áhuga fyri gongdini vestan fyr Hetland. Teir hyggja eisini við stórum spenningi eftir tí, sum í løtuni hendir á føryska økinum. Herfyri tók Mobil Oil upp samstarv við tvey stór oljufeløg, Statoil og Enterprice um at keypa seismiskt tilfar frá Western, sum í løtuni ger kanningar við Føroyar.

Phil Sands sigur, at Mobil Oil arbeiðir í fleiri blokkum vestan fyri Hetland. Her er serliga talan um blokkarnar 213 og 214, sum liggja har norður og heilt út móti føroyska markinum.

-Vit eru júst liðnir við 3D seismiskar kanningar av øllum hesum økinum, heilt upp at føroyska markinum. Vit arbeiða við tilfarinum í løtuni, men kunnu einki siga leggur Phil Sands afturat.

Hgartil hevur bara verið tosað um økini har suðuri, men tað tykist sum um oljufeløgini eru eins spent og bjartskygd, hvat viðvíkur møguleikanum at finna olju har norðuri eisini.



*Ein av serfrøðingunum hjá seismikkfelagnum Halliburton vísir tað føroyska økið á kortinum, sum hann heldur vera sera áhugavert, hetta er beint vestanfyri økið, har Mobil arbeiðir og hevur góðan vónir um at finna olju.*